tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 109 000dagur 12. juni 1997 71. árgangur Kr. 7,00

# Greenpeace hevur tikið Rokkin



Fyri at steðga oljuleiting millum Føroyar og Bretland hevur Greenpeace sett tríggjar mans á Rokkin

Síða 8

# Hava góðar vónir

Hóast tað ikki gekst so væl hjá bátunum úr Kollafirði á Norðoyastevnu, hava teir góðar vónir fyri einum betri úrsliti á Sundalagsstevnuni um vikuskiftið

**8 síður um Sundalagsstevnuna**



Manningin á Kjøli var ikki við á Norðoyastevnu, men venja nú til Sundalagsstevnuna

## Sosialistastevna í Malmö:

# Evropa aftur í arbeiði

Síða 4-5

VØRU-KOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM TIL FØROYA
Goymsla & Flytikassar
TILBOÐ verða givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading TRANSPORT
Tlf. 17272
Fax 15009

PLANTU marknaður
Upplatingartíðir mai-juni
Tysd.-leygard. kl. 10-18
Sunnud. og halgid. kl. 14-18
TRO og RUNNAR
STAUDUR
(fleirarsplantur)
SUMMARBLOMSTUR
(arsplantur)
GRONMETISSMAPLANTUR
URTAPOTTAR
MOLD - TOD - KALK
Okkara dygd tín trygd
Urtagarðurin í Kirkjubø
TLF 28062 - FAX 28116

FLOGFRAKT * SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIDA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 1 2222

*Vilja steðga oljuleiting á Atlantsmóti:*

# Greenpeace tikið Rokkin

*-Við at hertaka Rockall vilja vit vísa øllum heiminum, at stundin er komin til at gevast við allari oljuleiting. Atlantsmótið er eitt av nýggju leitingarøkjunum og eftir okkara tykki, eigur eingin olja at takast upp her í heilatikið sigur talskvinna hjá Greeenpeace. Hóast fokus her verður sett á leitingina í bretskum sjógvi skilur Sosialurin , at Føroyar eru einki undantak.*



JAN MULLER

Greenpeace í Bretlandi hevur tikið Rokkin ella Rockall. Hetta hendi gjáramorgunin. Ein tyrla setti trý fólk niður á einsamalla klettin í Norðuratlantshavi í einum yvirlivilsishylki.

Sue Cooper, pressutalskvinna hjá Greenpeace í London sigur við Sosialin, at tey hava gjørt hetta fyri at móttmæla alla oljuleiting á Atlantsmótinum te. „Atlantic Frontier", sum er alt tað stóra økið millum Hetland og Føroyar og so økið sunnan fyri millum Føroyar og Irland.

-Vit vilja hava alla oljuleiting steðgaða orsakað av tí ávirkan hon hevur á veðurlagsbroytingar.

Uppá fyrispurning um Greenpeace við tiltøkum sínum á hesum leiðum eisini vil steðga oljuleiting við Føroyar, sigur talskvinnan, at tað ger tað.

-Okkara grundleggjandi sjónarmið er, at øll nýggj leiting í heila tikið eftir olju eigur at steðgast, tí vit kunnu ikki loyva okkum at brenna bara so mikið sum ein fjórðing av teimum goymslum vit kenna til í dag - uttan at hetta skal fáa álvarsligar fylgjur.

*-Vit tosaðu við ein kampanjuleiðara hjá Greenpeace í Danmark herfyri og segði hann, at atgerðirnar og kampanjan hjá Greenpeace í Bretlandi hevði einki við føroyska økið ella Føroyar at gera!*

-Kampanjan í løtuni leggur seg eftir bretskum sjógvi, men okkara mál er at taka hetta mál upp globalt. So í veruleikanum mótarbeiða við øllum nýggjum leitingum, eisini tí í Føroyum.

Sue Cooper sigur, at orsøkin til at tey hava valt Rockall í hesi herferðini er tann, at heili fýra lond gera krav uppá Rockall og tí vóna tey, at stjórnirnar í øllum hesum londum fara at geva tiltakinum ans.

Greenpeace vil eisini vísa á dupultmoralin hjá stjórnum, sum øðrumegin siga, at neyðugt er við tiltøkum fyri at verja veðurlagið, men hinumegin skunda undir oljuleiting.

**Gevist við oljuleiting og tit fáa Rokkin aftur**

Greenpeacetalskvinnan sigur, at stjórnin kann fáa Rokkin aftur, tá hon steðgar leitingini eftir olju. -So tey trý fólkini hava gjørt seg út til at vera á klettinum leingi.

Stutt frá Rokkinum liggur so eitt av skipunum hjá Greenpeace.

Uppá fyrispurning um Greenpeace eisini hevur í hyggju at gera seg inn á feløgini, sum leita eftir olju, eitt nú við at forða teimum í at gera seismiskar kanningar sigur Sue Cooper, at Greenpeace í sínum kampanjum móti oljuleiting fer ikki at siga nakað um, hvørji tiltøk felagsskapurin fer at taka til í framtíðini.

Hon váttar tó, at Greenpeace hevur valt út júst Atlantsmótið í herferð síni móti oljuleiting og framleiðslu um allan knøttin - fyri at gera heimsins leiðandi ídnaðar og oljuframleiðandi tjóðir varugar við álvaran í herferðini hjá felagsskapinum.

Sosialurin skilur, at fólk í oljuvinnuni taka vaksandi virksemi hjá Greenpeace á Atlantsmóti í stórum álvara, tí júst hetta økið hevur so stóran týdning í leitingini hjá oljufeløgunum eftir nýggjum olju- og gasskeldum.

Herfyri útsetti BP framleiðsluna frá tí fyrstu oljukelduni vestan fyri Hetland í óvissa tíð. Orsøkin er sambært BP tann, at teir hava funnið onkur brek á útbúnaðinum, sum stendur á havbotninum og hetta vilja teir bøta um. Óváttaðar keldur vilja tó vera við, at ein orsøkin kann vera óttin fyri, at Greenpeace skal gera álvara av at steðga framleiðsluni so ella so.

Tað er ikki so langt síðani, at umboð fyri Greenpeace mótmæltu framleiðsluni á Foinaven uttan fyri høvuðsskrivstovuna hjá BP í Aberdeen.

Tað er greitt, at við tiltøkum sínum á Atlantsmótinum hevur Greenpeace eisini sett fokus á Føroyaleiðirnar, og spurningurin er, um hetta kann fáa ávirkan á kanningarnar og komandi oljuleitingina á føroyska landgrunninum. Eingin ivi er um, at fer tað at eydnast Greenpeace at steðga oljuleiting vestan fyri Hetland og við Rockall tvs. skamt frá okkara egna marki, so kemur túrurin eisini til Føroyar, tá fyrsta útbjóðingarumfar hevur verið og oljufeløgini av álvara skulu til at leita eftir olju.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá Oljufyrisitingini ella nøkrum oljufelag til hetta.




*Kort, sum Sosialurin fekk frá Greenpeace-høvuðsborgini í London í gjár.*




*Soleiðis sær yvirlivilsshylkið, sum Greenpeace hevur fest fast í Rokkin. Innan eru trý kend Greenpeacefólk*